Januar 2023

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Hundaábyrgdar-trygging*

betri trygging

# Hundaábyrgdartrygging


| | | |
|---|---|---|
| **A.** | **Lógargrundarlag** | **3** |
| **B.** | **Felagstreytir** | **3** |
| 1.0 | Tey tryggjaðu | 3 |
| 2.0 | Tryggjaðir hundar | 3 |
| 3.0 | Tryggingin fevnir um | 3 |
| 4.0 | Tryggingarhæddir | 3 |
| 5.0 | Tryggingartíð | 3 |
| 6.0 | Landafrøðiligt øki | 3 |
| **C.** | **Undantøk og avmarkingar** | **3** |
| 7.0 | Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd fyri | 3 |
| 8.0 | Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd fyri skaða á lutir | 3 |
| 9.0 | Avtalur um ábyrgd og endurgjald | 3 |
| 10.0 | Um tryggjaði hevur elvt til skaðan við vilja | 3 |
| 11.0 | Skaðafráboðan | 3 |
| **D.** | **Vanligar reglur** | **4** |
| 12.0 | Tryggingargjald v.m. | 4 |
| 13.0 | Tíðarskeið og uppsøgn | 4 |
| 14.0 | Uppsøgn aftaná skaða | 4 |
| 15.0 | Broyting av gjaldskránni og tryggingartreytunum | 4 |
| 16.0 | Tá tryggingin verður teknað | 4 |
| 17.0 | Vandabroytingar og flyting | 4 |
| 18.0 | Eigaraskifti | 4 |
| 19.0 | Trygdarásetingar | 4 |
| 20.0 | Dupulttrygging | 5 |
| 21.0 | Ósemjur | 5 |
| 22.0 | Innanhýsis kæruviðgerin | 5 |
| 23.0 | Kærunevndin | 5 |
| 24.0 | Yvirsýn | 5 |
| 25.0 | Varnarting | 6 |
| 26.0 | Angringarrættur | 6 |
| 27.0 | Prístalsjavning | 6 |

# Hundaábyrgdartrygging

## A. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## B. Tryggjaður fulnaður

**1.0 Tey tryggjaðu**
**1.1** Tryggingin fevnir um tryggingartakaran sum eigara av hundinum og tann sum hevur hundin.

**2.0 Tryggjaðir hundar**
**2.1** Tað sæst í tryggingarskjalinum, hvussu nógvir hundar eru tryggjaðir.

**2.2** Harumframt fevnir tryggingin um hvølpar, sum ikki eru 4 mánaðir gamlir, so leingi sum teir eru hjá mammuni.

**3.0 Tryggingin fevnir um**
**3.1** Tryggingin fevnir um ta endurgjaldsábyrgd, sum sambært hundalóginiverður løgd á tey tryggjaðu fyri skaðar, sum tryggjaði hundurin ger á fólk ella lutir.

**4.0 Tryggingarhæddir**
**4.1** Tryggingin veitir endurgjald upp til kr. 5.000.000 fyri skaðar á fólk.

**4.2** Tryggingin veitir endurgjald upp til kr. 2.000.000 fyri skaðar á lutir.

**5.0 Tryggingartíð**
**5.1** Tryggingin fevnir um endurgjaldskrøv fyri skaðar, sum henda, meðan tryggingin er í gildi.

**6.0 Landafrøðiligt øki**
**6.1** Tryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

## C. Undantøk og avmarkingar

**7.0 Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd fyri**
**7.1** fíggjarmiss, sum ikki er ein avleiðing av skaða á fólk ella lut.

**8.0 Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd fyri skaða á lutir**
**8.1**
**a)** sum tryggingartakarin ella tann, sum hevur hundin ella onkur í húski teirra sjálvur eigur,

**b)** sum tryggjaði ella tann, sum hevur hundin ella onkur í húski teirra hevur til

**1.** láns
**2.** leigu
**3.** goymslu
**4.** nýtslu
**5.** flutnings
**6.** ella av aðrari orsøk hevur í varðveitslu.

**9.0 Avtalur um ábyrgd og endurgjald**
**9.1** Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd, sum er ein fylgja av tilsøgn frá tryggjaða um annað endurgjald ella eina ábyrgd, sum gongur víðari enn tað, sum er ásett í hundalóggávuni.

**10.0 Um tryggjaði hevur elvt til skaðan við vilja**
**10.1** Tryggingarfelagið hevur rætt til at krevja goldið endurgjald aftur frá tryggjaða, sum er fyltur 15 ár (t.v.s. eigara ella tí, sum hevur hundin), um tryggjaði hevur elvt til skaðan við vilja.

**10.2** Tað er t.d. galdandi um tryggjaði hevur beitt hundin eftir fólki ella øðrum djórum.

**11.0 Skaðafráboðan**
**11.1** Beinanvegin tryggingartakari fær at vita ella hevur varhugan av, at endurgjaldskrav verður sett fram móti honum, skal hann boða felagnum frá hesum.

**11.2** Viðurkenning av endurgjaldsskyldu og góðtøka av endurgjaldskravi kunnu bert gerast við samtykki frá felagnum, og felagið tekur annars avgerð um viðgerðina av endurgjalds-spurninginum.

**11.3** Í tann mun felagið hevur veitt endurgjald, yvirtekur felagið í øllum viðurskiftum rættin hjá tryggjaða til møgulig krøv mótvegis triðjamanni.

# Hundaábyrgdartrygging

## D. Vanligar reglur

**12.0 Tryggingargjald v.m.**
**12.1** Tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið fella til gjaldingar beinanvegin, tryggingin kemur í gildi.

**12.2** Tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið verða kravd við inngjaldingarkorti. Gjaldkrøv verða send til tann av tryggingartakaranum fráboðaða gjaldstað.

**12.3** Vera tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ikki goldin, tá ið krav er sent, sendir tryggingarfelagið áminning í fyrsta lagi 14 dagar aftaná.

Henda áminning inniheldur upplýsingar um rættarávirkanina, um tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ikki vera goldin, áðrenn tíðarfreistin, sum stendur í áminningini, er farin.

**12.4** Eru tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ikki goldin í seinasta lagi 14 dagar aftan á áminning, er tryggingarfelagið leyst av ábyrgd, og tryggingartakarin hevur ikki rætt til endurgjald.

**12.5** Tryggingarfelagið skilar sær rætt til at krevja eykakostnaðin av hesum endurgoldnan.

**13.0 Tíðarskeið og uppsøgn**
**13.1** Tryggingin stendur við, til tryggingartakarin ella tryggingarfelagið skrivliga sigur hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

**14.0 Uppsøgn aftaná skaða**
**14.1** Uttan mun til ta í § 13.00 nevndu freist, hava bæði tryggingarfelagið og tryggingartakarin rætt til at siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um hetta verður gjørt innan 14 dagar eftir, at ein skaði er goldin ella avvístur.

**15.0 Broyting av gjaldskránni og tryggingartreytunum**
**15.1** Ger tryggingarfelagið broytingar í gjaldskrá síni, ella tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til við 1 mánaða ávaring at seta nevndu broytingar í verk.

**15.2** Vil tryggingartakarin ikki góðtaka eina hækking av tryggingargjaldinum ella strangari tryggingartreytir, kann tryggingin sigast upp av báðum pørtum við 14 daga ávaring.

**16.0 Tá tryggingin verður teknað**
**16.1** Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at tær í tryggingarskjalinum nevndu upplýsingar eru rættar.

**16.2** Skeivar upplýsingar kunnu, sambært tryggingaravtalulógini §§ 4-10 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

**17.0 Vandabroytingar og flyting**
**17.1** Tryggingartakarin eigur at siga Betri Trygging frá,soleiðis at tryggingarfelagið kann avgera, um ella undir hvørjum treytum tryggingin kann halda fram, tá:

**a)** tryggjaði fær fleiri hundar enn nevnt er í tryggingarskjalinum. Hetta er tó ikki galdandi um tryggjað tík hevur hvølpar hjá sær, sum ikki eru 4 mánaðir gamlir.

**b)** hundurin skiftir eigara.

**c)** flutt verður bústað.

**17.2** Verður slíkt ikki fráboðað, kann tað sambært tryggingaavtalulógini §§ 45–50 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

**17.3** Tryggingarfelagið hevur, tá ið tað verður kunnugt um nevndu broytingar, rætt til at broyta tryggingartreytirnar og -gjaldið beinanvegin.

**17.4** Verða vandarnir broyttir so nógv, at ábyrgdin gerst so stór, at tryggingarfelagið – um tað visti av hesum frammanundan – ikki hevði góðkent, at ein trygging varð teknað, heldur endurgjaldsskylda felagsins uppat í somu stund, sum broytingin er gjørd.

**18.0 Eigaraskifti**
**18.1** Fer eigaraskifti fram, skal Betri Trygging hava skrivlig boð um hetta beinanvegin.

**18.2** Tann nýggi eigarin er tryggjaður, til nýggj trygging er teknað, tó í longsta lagi 4 vikur frá yvirtøkudegi. Er nevnda fráboðan ikki latin innan nevndu freist, er tryggingin burturdottin.

**19.0 Trygdarásetingar**
**19.1** Eru sett forboð og/ella krøv í tryggingarskjalinum, sum skulu vera hildin ella lokin, áðrenn skaðin hendir, til tess at fyribyrgja ella minka skaðan, og hevur tann tryggjaði ella onnur, ið hava skyldu at ansa eftir, at hesi krøv verða fylgd, ikki syrgt fyri hesum, hevur tann tryggjaði bert krøv móti Betri Trygging, um og tá prógvast kann, at skaðin ikki hendi ella gjørdist størri av tí, at hesi forboð og/ ella krøv ikki eru hildin ella lokin. Sí tryggingaravtalulógina §51.

# Hundaábyrgdartrygging

**20.0 Dupulttrygging**
**20.1** Eru somu áhugamál tryggjað ímóti sama vanda í øðrum felagi, skal boðast Betri Trygging frá hesum, samstundis sum skaðin eisini skal boðast hinum felagnum.

**20.2** Hevur hitt felagið tikið fyrivarni um, at einki endurgjald verður latið, ella at hetta verður avmarkað, um so er, at trygging er teknað í fleiri enn einum felagi, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging.

**20.3** Endurgjaldið verður tá at gjalda lutfalsliga av feløgunum.

**21.0 Ósemjur**
**21.1** Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg í samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

**21.2** Talan kann vera um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaða-avgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

**21.3** Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

**21.4** Um semja ikki fæst, eru fýra møguleikar at fara víðari við málinum, sí §§ 22.0 til 25.0.

**22.0 Innanhýsis kæruviðgerin**
**22.1** Kærast kann til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging.

**22.2** Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

**22.3** Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er farið fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

**22.4** Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:

Betri Trygging P/F
Kæruviðgerin
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella við teldubrævi til:
betri@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

**23.0 Kærunevndin**
**23.1** Kærast kann beinleiðis til donsku kærunevndina, uttan fyrst at kæra til innanhýsis kæruviðgeran.

**23.2** Skrivlig kæra – skrivað á donskum – skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

**23.3** Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður.

Sí: http://www.ankeforsikring.dk

**23.4** Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

**23.5** Kæran skal sendast til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaardsgade 2
Postbox 360
1572 København V.
Tlf. nr.: 0045 33 15 89 00
Fax nr.: 0045 33 15 89 10

**24.0 Yvirsýn**
**24.1** Er tvídráttur um skaðauppgerðina, t.v.s. um, hvussu nógv tað kostar í krónum og oyrum at gera skaðan aftur, kunnu tryggingartakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

**24.2** Metingarmenninir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein uppmann, sum eisini skal vera óheftur. Verða teir ikki samdir um uppmann, velur Sorinskrivarin hann.

**24.3** Metingarmenninir gera uppgerðina í neyvum samsvari við ásetingarnar í tryggingartreytunum og -skjalinum og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

**24.4** Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar. Verða metingarmenninir ikki samdir um skaðauppgerðina, er tað uppmaðurin, ið, innan fyri rammurnar av tí, ið metingar-menninir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingar-mennirnir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýn-inum verður at býta millum partarnar.

# Hundaábyrgdartrygging

**25.0 Varnarting**
**25.1** Um tað ikki verður valt at nýta omanfyri nevndu møguleikar, ber til at leggja ávísar ósemjur fyri rættin.

**25.2** Mál, ið verða løgd fyri rættin, skulu avgerast eftir føroyskum/donskum rætti við føroyskan/danskan dómstól.

**26.0 Angringarrættur**
**26.1** Tryggingin kann verða strikað frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum tryggingarfelagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

**27.0 Prístalsjavning**
**27.01** Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 2 prosentum í mun til árið fyri. Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

**27.02** Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.